[redacted]




*Fiat Doblò Cargo er kosin "Van of the Year 2011" í Evropa*

## Fiat Doblò Cargo er kosin »Van of the Year 2011« í Evropa

Grundgevingarnar hjá dómsnevndini fyri at útnevna Fiat Doblò Cargo til ársins vørubil í Evropa vóru m.a. at bilurin er økonomiskur og tryggur, umframt at hann er tann bilurin sum lastar mest í sínum klassa og er sera væl útgjørdur í mun til prísin.

Fiat Doblò Cargo verður gjørdur í tveimum longdum og fæst við Euro5-góðkendum 1.3 og 1.6 MultiJet dieselmotorum. Fiat var eisini ársins vørubilur í 2006, 2008 og 2009.




# Harley Davidson nummar 100

## Mánadagin 20. september 2010 kom Harley Davidson súkkla nummar 100 í land í Havn.

Talan er um eina Dyna Super Glide Custom, sum er nr. 100 í røðini av Harley Davidson motorsúkklum í Føroyum, síðan innflutningurin av súkklunum byrjaði í 1995.

Sølan av motorsúkklum er vaksin nógv í Føroyum seinastu árini, serliga eftir at skrásetingargjaldið på motorsúkklum lækkaði í 2006. Ove Ritter, sum eigur og rekur Harley Davidson handilin, sigur, at fólk generelt eru vorðin meira tilvitað um at hava aktiv frítíðarítriv, har bæði maður kona kunnu njóta góðar upplivingar á føroysku vegunum og í náttúruni.

Harley Davidson er ikki nakað nýtt í Føroyum. Fyrstu Harley, sum vit vita um, komu í 1964, tá tveir Harley 250 cc skutarar komu til Klaksvíkar. Hetta slagið av skutarum eru í dag eftirspurdir sum samlaraobjekt.

Fyri 15 árum síðan byrjaði Ove Ritter, sum altíð hevur havt ein brennandi áhuga fyri Harley Davidson, at innflyta Harley motorsúkklur til Føroyar. Ove sigur, at ikki tvær av teimum 100 súklunum hann hevur selt hava verið eins. Allar verða tær gjørdar og umbygdar eftir sum kundin ynskir tað. Harley Davidson var mest selda motorsúkkla í Føroyum í 2009 eins og higartil í ár, sigur Ove Ritter.

At koyra Harley er fyri tey flestu ein lívsstílur og ein kensla av at hoyra til ein heimsumfatandi felagsskap. Heimsins størsti MC-felagsskapur www.HOG.dk telur yvir eina millión limir. Í føroyska Harley felagsskapinum www.HDC.FO eru í dag 66 limir, sum skipa fyri túrum, upplivingum og felagstilkøkum bæði í Føroyum og uttanlands. Fleiri upplýsingar eru á: www.HD.fo ella á tel. 210405.

*Her er motorsúkkla nr. 100, ein Dyna Superglide Custom FXDC árgang 2011, sum kostar um 200.000 krónur*

